# Eykaprógv í føroyskum

Skúlaárið 2016/17 skipar Mentamálaráðið í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya fyri skeiði í føroyskum fyri føroyskar fólkaskúlalærarar, ið hava útlendskt læraraprógv. Útlendskir lærarar, sum eru í starvi ella søkja starv í Føroyum, hava eisini møguleika at luttaka. Fortreytin er, at viðkomandi hava ognað sær kunnleika í føroyskum, sum í minsta lagi svarar til 9. flokk. Skeiðið, sum er grundin undir eykapróvtøku í føroyskum, fevnir í høvuðsheitum um málpartin í kravda grundskeiðnum í føroyskum eftir gomlu læraraútbúgvingini.

**Undirvísingin**

Skeiðið verður skipað sum vikuskiftisskeið eina ferð um mánaðin, annars sum fjarlestur. Lesandi eru saman frá kl. 13.00 – 17.00 fríggjadag og frá kl. 09.00 – 15.00 leygardag. Skeiðið verður hildið á Námsvísindadeildini og byrjar 24. august 2017 kl. 10.00. Lærari á skeiðnum verður Jonhard Mikkelsen.

**Innihald**

**1. Partur**

Undirvíst verður í stavsetingarreglum. Tilfarið verður grundað rættskrivingarreglurnar í *Føroysk orðabók* J.H.W.Poulsen o.o. Fyrsti partur av *Grundskeiði í føroyskum* eftir Jonhardi Mikkelsen verður lisin.

**2. Partur**

Undirvíst verður í **orðfeingi og málbót**. Tilfarið verður m.a. grundað á *Orð og orðað* eftir Svenning Tausen og annar og triði partur av *Grundskeiði í føroyskum* eftir Jonhard Mikkelsen verður lisin.

**3. Partur**

Fatar um orðalagslæru. Brúktar verða: Orðalagslæra Jeffrei Henriksen og Ein ferð inn í føroyskt eftir Kára Davidsen og Jonhard Mikkelsen.

**4. Partur**

Í fjórða parti verða tættirnir í teimum fyrru trimum stigunum flættaðir saman.

Tvær vikur eftir, at málskeiðið er liðugt, verður skrivlig 5-tíma próvtøka, sum verður dømd við próvtali.

**Tíðarætlan fyri skeiðið skúlaárið 2016/17**

| **2016** | **2017** |
|---|---|
| Fríggjad./leygard.: 26 – 27- aug. | Fríggjad./leygard.: 20 – 21. jan. |
| Fríggjad./leygard.: 23 – 24. sept. | Fríggjad./leygard.: 17 – 18. febr. |
| Fríggjad./leygard.: 21– 22. okt. | Fríggjad./leygard.: 17 - 18. mars |
| Fríggjad./leygard.: 18 – 19. nov. | Fríggjad./leygard.: 21 – 22. apr. |
| Fríggjad./leygard.: 9 – 10. des. | Fríggjad./leygard.: 19 – 20. mai |

Fyrispurningar um skeiðið kunnu sendast til Janus Jensen, Fróðskaparsetur Føroya, janusj@setur.fo. og Jenny Lydersen, Mentamálaráðið, jenny@mmr.fo. Umsøkjarar boða frá luttøku í teldubrævi hjá gunnvore@mmr.fo í seinasta lagi 7. juli 2016. Skeiðið er tó treytað av, at í minsta lagi 15 luttakarar tekna seg til skeiðið.